# Fíggjarmálaráðið

## Frágreiðing

### Fíggjarlógaruppskotið 2012

September 2011

# INNIHALDSYVIRLIT

FORORÐ ............ 2
1. ALTJÓÐA BÚSKAPURIN ............ 3
2. FØROYSKI BÚSKAPURIN ............ 6
  2.1 Samanumtikið um búskaparliga virksemið ............ 6
  2.2 Uttanlandshandil ............ 7
  2.3 Lønargjaldingar ............ 9
  2.4 Arbeiðsloysið ............ 10
  2.5 Brúkaraprístalið ............ 11
  2.6 Skatta- og avjgaldsinntøkurnar hjá landi og kommunum ............ 13
  2.7 Útlit um føroyska búskapin ............ 13
3. LANDSKASSARAKSTURIN 2000-2011 ............ 15
  3.1 Inntøkur landskassans 2000-2011 ............ 15
  3.2 Útreiðslur landskassans 2000-2011 ............ 16
  3.3 Úrslit landskassans 2000-2011 ............ 17
  3.4 Skuld landskassans 2006-2011 ............ 17
4. FÍGGJARLÓGARUPPSKOTIÐ 2012 ............ 19
  4.1 Inntøkur landskassans í 2012 ............ 19
  4.2 Útreiðslur landskassans í 2012 ............ 20
  4.3 Úrslit landskassans í 2012 ............ 20
5. JÁTTANAREFTIRLIT 2011 ............ 21
  § 2 Løgmansfyrisitingin ............ 22
  § 3 Fíggjarmál ............ 22
  § 5 Fiskivinnumál ............ 23
  § 6 Vinnumál ............ 23
  § 7 Mentamál ............ 24
  § 11 Heilsumál ............ 25
  § 12 Almannamál ............ 26
  § 15 Innlendismál ............ 27
  § 20 Inntøkur ............ 27

Fíggjarmálaráðið
Postboks 2039
FO-165 Argir
Telefon: 35 20 20
Telefax: 35 20 25
**www.fmr.fo**

## FORORÐ

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2012 eru ongar politiskar raðfestingar. Fíggjarlógaruppskotið er grundað á framskrivingar av verandi virksemi. Orsøkin til hetta er, at løgtingsval varð útskrivað 27. september 2011. Fíggjarlógaruppskotið fyri 2012 skal sambært stýrisskipanarlógini vera lagt fram áðrenn 1. oktober 2011.

# 1. ALTJÓÐA BÚSKAPURIN

Nú valdar aftur stór óvissa um gongdina í altjóða búskapinum og nógvur fjáltur er á virðis- og partabrævamarknaðunum, har kursirnir eru nógv falnir í seinastuni. Árið byrjaði annars gott við góðum útlitum og stórum vøkstri, men í vár minkaði ferðin á vøkstrinum.

Ein orsøk til minkandi ferðina er náttúruvanlukkan í Japan í mars í ár, sum hevur ávirka altjóða handilin og framleiðsluna skeiva vegin. Náttúruvanlukkan í Japan hevur ikki bert rakt japanska búskapin meint. Japan er stórur undirveitari í framleiðslutilgongdini í nógvum framkomnum londum, og tí hevur japanska náttúruvanlukkan eisini óbeinleiðis rakt framleiðsluna í altjóða búskapinum. Harumframt eru rávøruprísirnir, ikki minst oljuprísirnir, hækkaðir nógv seinna hálvár 2010 til á vári í ár.

Náttúruvanlukkan í Japan og hækkandi rávøruprísir hava ikki varandi árin á gongdina í altjóða búskapinum. Útlit eru fyri fallandi rávøruprísum, og í Japan verður øll framleiðslan tikin upp aftur, tá ið skaðarnir eftir náttúruvanlukkuna eru umvældir. Tað eru harafturímóti vánaligu lyklatølini seinastu mánaðirnar, serliga um amerikanska búskapin, sum hava skapt fjáltur og ótryggleika á virðis- og partabrævamarknaðunum.

Vánaligu lyklatølini hava sátt iva um styrkina og haldførið í tiltøkunum at endurreisa altjóða búskapin eftir fíggjar- og búskaparkreppuna í 2008. Nýggjastu lyklatølini geva eina ábending um, at tað gongur seint og misjavnt at fáa gongd á aftur búskapin í ymsu londunum. Ferðin á amerikanska búskapinum minkaði munandi fyrra hálvár í ár samanborið við ferðina alt árið 2010. Í Evruøkinum minkaði ferðin í 2. ársfjórðingi eftir rættiliga stóran vøkstur í 1. ársfjórðingi, men tað er stórur munur á londunum í Evruøkinum. Í nøkrum av Evrulondunum, við stórari almennari skuld og stórum almennum halli, hevur vøksturin verið negativur, meðan vøksturin hevur verið rættiliga stórur í øðrum londum, t.d. í Týsklandi og í Svøríki, har BTÚ-vøksturin var ávikavist 3,5 og 5,75% í 2010. Í juni í ár var arbeiðsloysið í Evruøkinum 9,9%, sum er nakað minni enn í 2010, tá ið tað var 10,2%.

Vánaligu lyklatølini hava kveikt lív í aftur kjakið, hvørt eitt sokallað *double dip*[1] er fyri framman í altjóða búskapinum. Fleiri búskaparfrøðingar meta, at vandin fyri hesum er øktur, men støðan er ikki eins hættislig, sum fyri fíggjarkreppuna í 2008, tí bæði vinna og húsarhald eru minni skuldabundin nú, eins og bústaða-marknaðirnir ikki longur eru yvirupphitaðir. Nýggjastu lyklatølini geva tí ikki beinleiðis ábendingar um, at ein nýggj búskaparkreppa stendur fyri framman. Tølini benda heldur á, at ferðin á vøkstrinum fer at verða lægri. Óvissan snýr seg um, hvørt vánaligu lyklatølini og fallið á kursunum á partabrævamarknaðunum hevur við sær, at nýtslu- og íløguhugurin hjá brúkarum og vinnum minkar.

[1] Hugtakið *double dip* merkir í hesum sambandi, at royndirnar at endurreisa altjóða búskapin eftir fíggjarkreppuna enda við einari nýggjari búskaparkreppu.

Stóra almenna hallið og skjótt vaksandi almenna skuldin í USA og nógvum vesturevropeiskum londum skapa eisini stóra óvissu um gongdina í altjóða búskapinum komandi árini. Tað almenna hevur roynt at stimbra búskaparliga virksemið eftir fíggjar- og búskaparkreppuna, samstundis sum almennu inntøkurnar hava verið fallandi. Harumframt høvdu fleiri stór lond hall á fíggjarlógini meðan búskaparligi hákonjunkturururin var í hæddini árini fyri 2008. Almenna skuldin er tí nógv vaksin og fer allarhelst at halda fram við at vaksa komandi árini. Almenna skuldin er tí vorðin ein stórur trupulleika í USA og fleiri londum í evruøkinum, sum longu eru komin í eina skuldarkreppu. Her er tað serliga Grikkaland, og óttin fyri at kreppan í Grikkalandi fer at spjaða seg til onnur lond í Evruøkinum, sum er ovast á breddanum í løtuni.

Í USA er almenna hallið farið úr 3% av BTÚ upp í 11,25% av BTÚ frá 2007 til 2010. Sama tíðarskeið er almenna bruttoskuldin farin úr 64,5% av BTÚ upp í 93,25% av BTÚ, og væntandi verður bruttoskuldin omanfyri 100% av BTÚ í 2012. Skjótt vaksandi skuldin hevur havt við sær, at USA, fyri fyrstu ferð nakrantíð, hevur mist hægstu kredittmetingina AAA og nú hevur kredittmetingina AA+. Grundgevingin fyri at minka kredittmetingina er m.a., at tað ikki eru nóg greiðar politiskar ætlanir um at fáa tamarhald á skjótt vaksandi almennu skuldini.

Fyri at fáa tamarhald á skjótt vaksandi almennu skuldini og fyri at styrkja búskapin í ES-økinum, hevur ES-nevndin givið 24 av teimum 27 ES-londunum boð um at fáa almenna hallið niður um 3% av BTÚ. Fíggjarpolitikkurin í ES-økinum, sum hevur verið serstakliga stimbrandi eftir fíggjar- og búskaparkreppuna í 2008, er tí strammaður munandi upp seinastu tíðina, og í 2010 hevur fíggjarpolitikkurin tálmað búskaparliga virksemið eitt lítið vet í øllum ES-økinum samanlagt. Fíggjarpolitikkurin í ES-økinum fer allarhelst at virka enn meiri tálmandi á búskaparliga virksemið í 2011 og í 2012.

Samstundis sum tað gongur striltið at endurreisa búskapirnar í USA og vesturevropa er stórur vøkstur í búskaparliga virkseminum í Kina, India og øðrum menningarlondum, sum hava ment seg nógv búskaparliga seinastu árini. Í 2. ársfjórðingi í ár var vøksturin í kinversku bruttotjóðarúrtøkuni 9,5%. Nógva virksemið í hesum londunum leggur stórt trýst á arbeiðsmarknaðin og vandi er tí fyri inflasjón. Fyri at minka um inflasjónstrýstið hava fleiri av londunum tí hert pengapolitikkin.

Samanumtikið er vøksturin í flestu ídnaðarlondunum farin niður í ferð í seinastuni, og óvissan um førleikan og viljan at fáa tamarhald á almenna hallinum og skuldini í ymsu londunum, fer allarhelst at hava við sær, at vit kunnu vænta okkum løtur við illveðri á virðisbrævamarknaðunum komandi tíðina. Stóru fíggjarlógarhallini og stóra almenna skuldin merkja eisini, at eingin fíggjarpolitisk orka er eftir at stimbra búskaparliga virksemið.

Við pengapolitikkinum er beint øvugt. Fyri nøkrum fáum mánaðum síðan vóru útlit fyri, at evropeiski miðbankin ECB fór at reka ein tálmandi pengapolitikk við at hækka rentuna í fleiri umførum, men nú eru ikki útlit fyri fleiri rentuhækkingum. Heldur tvørturímóti eru útlit fyri, at rentan møguliga verður lækka aftur. ECB

hevur, fyrra hálvár í ár, í tveimum umførum hækkað rentuna 0,25%, hvørja ferð, men á seinasta tíðindafundinum í ECB, varð kunngjørt, at rentan ikki verður hækkað aftur fyribils. Fleiri eygleiðarar hildu seg eisini kunna lesa ímillum linjurnar, at tað eru møguleikar fyri rentulækkingum seinni í ár.

Eisini oljuprísurin er lækkaður aftur, eftir at hann hækkaði nógv síðstu mánaðirnar í 2010 og fyrra hálvár í 2011. Tað er sjálvandi trupult at siga, hvussu gongdin í oljuprísunum verður frameftir, men at ferðin á vøksturin í búskaparliga virkseminum, sum nú, fer niður, merkir vanliga, at prísurin á olju og øðrum rávørum verður trýstur niðureftir. Kollveltingarvárið í fleiri arabiskum londum hevur eisini ávirkan á gongdina í oljuprísinum.

# 2. FØROYSKI BÚSKAPURIN

## 2.1 Samanumtikið um búskaparliga virksemið

Tíðliga í 2008 vendi búskaparligi bráðvøksturin og hákonjunkturin til eina djúpa afturgongd. Í fyrstuni var afturgongdin avmarkað til fiskivinnuna, sum hevði stórar trupulleikar við skjótt vaksandi oljuprísum, lágum fiskaprísum og vánaligum fiskiskapi. Á heysti 2008 hevði búskaparliga afturgongdin rakt allan tann føroyska búskapin. Altjóða fíggjarkreppan hevði tá spjatt seg til føroysku peningastovnarnar, ið fingu stórar gjaldføristrupulleikar og tí smekkaðu lokið á kassan. Hetta merktu heimligu handils-, tænastu og byggivinnurnar alt fyri eitt við einum stórum falli í privata eftirspurninginum.

Í 2008 minkaði virðisøkingin í fiskivinnuni við einum triðingi, úr 1,4 mia. kr. niður undir milliardina. Byggivinnan merkir meira enn flestu aðrar vinnur sveiggini í búskapinum. Árini við búskaparliga bráðvøkstrinum, frá 2005 til 2008, vaks virðisøkingin í byggivinnuni út við 50%, úr 600 mió. kr. upp í 900 mió. kr. Síðan er virðisøkingin minkað við góðum fjórðingi niður í 650 mió. kr.

Afturgongdin helt fram í 2009, sum var eitt serstakliga vánaligt ár fyri føroyska búskapin, men í 2010 kom framgongd í aftur føroyska búskapin, tá vøksturin í bruttotjóðarúrtøkuni var 3,3% í leypandi prísum, sí mynd 2.1. Tað er tó sera ójavnt, hvussu gongdin hevur verið í ymisku vinnunum. Heildarmyndin er, at í 2010 hevur verið stór framgongd í tilfeingisvinnunum, afturgongd í flestu øðrum privatum vinnum og nakað av vøkstri hevur verið í almenna virkseminum.

**Mynd 2.1: Føroyska bruttotjóðarúrtøkan í ársins prísum, 1998-2010**




*Kelda: Hagstova Føroya*

Samstundis sum afturgongd hevur verið í næstan øllum vinnugreinum seinastu árini hevur stór framgongd verið í alivinnuni, sum tí hevur fingið stóran týdning fyri føroyska búskapin. Virðisøkingin í alivinnuni var um 600 mió. kr. í 2010

samanborið við 360 mió. kr. í 2009. Vøksturin stavar serliga frá høgum prísum á alifiski. Útlitini fyri hægri framleiðslu í alivinnuni næstu árini eru góð. Tøkan var góð 39 tús. tons í kruvdari vekt í 2010, sí mynd 2.2, og alivinnan metir, at tøkan verður umleið 50 tús. tons í kruvdari vekt í ár. Útsetingin næstu 2-3 árini verður størri sammett við undanfarin ár, so tøkan fer væntandi at verða umleið 50-60 tús. tons í kruvdari vekt næstu 2-3 árini.




## 2.2 Uttanlandshandil

Útflutningurin fyrstu 7 mánaðirnar í ár var 110 mió. kr. hægri enn somu mánaðir í fjør. Verða skipini tikin burturúr, so var munurin 72 mió. kr. ella 3%.

Í 2010 var útflutningsvirðið á alifiski umleið 1,4 mia. kr. Fyrstu sjey mánaðirnar í ár hevur alivinnan útflutt fyri 988 mió. kr., sí talvu 2.1. Hetta eru 253 mió. kr. ella 34% meira enn somu tíð í fjør. Samlaði fiskavøruútflutningurin var 2.443 mió. kr. fyrst 7 mánaðirnar í ár. Alivinnan stendur sostatt fyri góðum 40% av føroyska fiskavøruútflutningsvirðinum í løtuni.

**Talva 2.1: Útflutningurin jan.-jul. skift á høvuðsbólkar**

| *Mió. kr.* | **2010** | **2011** | **Munur** | **% munur** |
|---|---|---|---|---|
| Botnfiskur | 907 | 769 | -138 | -15 |
| Flundrufiskur | 79 | 86 | 6 | 8 |
| Alifiskur | 735 | 988 | 253 | 34 |
| Uppisjóvafiskur* | 305 | 347 | 42 | 14 |
| Skeljafiskur | 85 | 79 | -6 | -7 |
| Annar fiskur og fiskaúrdráttir | 260 | 175 | -85 | -33 |
| Aðrar vørur | 98 | 83 | -15 | -16 |
| Skip | 215 | 268 | 53 | 25 |
| **Útflutningur tilsamans** | **2.683** | **2.793** | **110** | **4** |
| **Fiskavøruútflutningur tilsamans** | **2.370** | **2.443** | **72** | **3** |

*Kelda: Hagstova Føroya.*
**Tað skal viðmerkjast, at seinkingar eru í skrásetingunum hjá Hagstovuni. Tí er meira útflutt av uppsjóvarfiski enn skrásett er í talvuni.*

Meðan stórur vøkstur er í útflutningi av alifiski, er minking í serliga tveimum bólkum. Fyri botnfiskin er útflutningurin av upsa minkaður meira enn 120 mió. kr. í ár, hýsuútflutningurin minkaði eisini, meðan toskurin dregur nakað uppeftir. Har er útflutningurin vaksin góðar 40 mió. kr. Í bólkinum fiskaúrdráttir er minni útflutt av fiskamjøli. Stóri vøksturin í alivinnuni seinastu árini hevur við sær størri fóðurnýtslu, og fiskamjølið verður tí helst brúkt til fóðurframleiðslu í Føroyum, heldur enn tað verður útflutt.

Fyrstu 7 mánaðirnar í ár var føroyski innflutningurin 3,0 mia. kr. samanborið við 2,6 mia. kr. somu tíð í fjør. Hesin vøksturin svarar til 17%. Verða skipini tikin burturúr er vøksturin 14%, sí talvu 2.2. Umleið ein fimtingur av innflutninginum er brennievni. Tað sæst aftur í innflutningstølunum, at stórar príshækkingar hava verið á brennievni. Um prísvøksturin á brennievni og skipini verða tikin burturúr, so hevur vøksturin í innflutninginum kortini verið 10,5%.

**Talva 2.2: Innflutningurin jan.-jul. skift á høvuðsbólkar**

| *Mió. kr.* | **2010** | **2011** | **Munur** | **% munur** |
|---|---|---|---|---|
| Til hav- og landbúnað | 67 | 152 | 85 | 128 |
| Rávøra til fiskavirking | 114 | 82 | -32 | -28 |
| Tilfar til byggivinnuna | 199 | 203 | 4 | 2 |
| Tilfar til annan ídnað | 462 | 523 | 61 | 13 |
| Maskinur og amboð | 196 | 206 | 10 | 5 |
| Brennievni | 516 | 644 | 128 | 25 |
| Akfør | 68 | 107 | 39 | 57 |
| Til beinleiðis húsarhaldsnýtslu | 687 | 707 | 20 | 3 |
| Skip og flogfør | 253 | 379 | 126 | 50 |
| **Innflutningur tilsamans** | **2.562** | **3.004** | **442** | **17** |
| **Tilsamans uttan skip og flogfør** | **2.309** | **2.625** | **316** | **14** |

*Kelda: Hagstova Føroya.*

Tað er hav- og landbúnaður, sum stendur fyri nógv tí størsta vøkstrinum við heili 128%, og har snýr tað seg serliga um fóður til alivinnuna. Í innflutninginum til onnur vinnulig endamál var framgongd í tilfari til ídnaðarliga framleiðslu, maskinur og amboð, og eisini í innflutninginum til byggivinnuna var ein lítil framgongd. Innflutningurin av akførum vaks heili 57% og í innflutninginum til beinleiðis nýtslu var eisini ein lítil vøkstur. Mynd 2.3 vísir úrslitið á føroyska handilsjavnanum frá 1988 til 2010.



**Mynd 2.3: Føroyski handilsjavnin, 1988-2010**

## 2.3 Lønargjaldingar

Í síðsta ársfjórðingi í 2010 varð føroyski búskapurin skakaður av tveimum ógvusligum hendingum, tá ið Eik Banki og Fiskavirking fóru á húsagang. Hesir húsagangir loyptu hvøkk á flestu føroyingar, samstundis sum verkbannið í fiskiflotan-

um hevði við sær, at afturgongd var í lønargjaldingunum í fiskivinnuni fyrsta ársfjórðing í ár. Hetta hevði við sær, at ferðin á búskaparvøkstrinum minkaði heilt nógv, men vøksturin steðgaði ikki. Hagtølini fyrstu 7-8 mánaðirnar í ár benda á, at føroyingar hava lagt hvøkkirnar aftur um seg. Vøkstur er í lønargjaldingunum umvegis a-skattaskipanina, sí mynd 2.4, samstundis sum innflutningurin veksur og arbeiðsloysið minkar.




## 2.4 Arbeiðsloysið

Talið á arbeiðsleysum vaks nógv, tá ið Fiskavirking snaraði lykilin um í desember 2010, men talið av arbeiðsleysum er minkað aftur, samstundis sum fleiri fiskavirkir er latin upp aftur við nýggjum eigarum. Í februar í ár var arbeiðsloysisprosentið 7,9%, men er síðan minkað aftur niður á 6,3% í juli í ár, sí mynd 2.5.




## 2.5 Brúkaraprístalið

Annan ársfjórðing í ár vóru brúkaraprísirnir 2,2% hægri enn sama ársfjórðing í fjør, sí talvu 2.3. Vøksturin stavar serliga frá dýrari orku og matvørum. Prísvøksturin á orku stavar frá príshækkingum uttanífrá og frá avgjaldshækkingum á diesel og øðrum oljuúrdráttum. Harumframt er prísurin á ravmagni farin munandi upp. Brennioljan til húsarhald, sí mynd 2.6, er farin 16,1% upp, og prísurin á ravmagni er farin 11% upp. Prísirnir á brennievni til akfør eru hækkaðir 17,5%. Prísirnir í flestu matvørubólkum eru farnir upp seinasta árið, og samanlagt eru matvørur dýrkaðar 2,3%. Prísirnir á samskifti eru lækkaðir.

Frá fyrsta til annan ársfjórðing í ár hækkaði brúkaraprístalið 0,5%. Mesti prísvøksturin hevur verið í nýtslubólkunum Flutningur og Hotell og matveitrarar, sum eru farnir 1,9% upp. Matvøruprísirnir eru hækkaðir 0,7% seinasta ársfjórðingin. Prísirnir á samskifti og býli lækkaðu frá fyrsta til annan ársfjórðing í ár.

**Talva 2.3: Gongdin í brúkaraprístalinum, 2010-2011**

| | *Lutfall* | *Ársfjórðingar* | | *Vøkstur í %* | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **2007** | **01** | **02** | **01-02 2011** | **02-02 10-11** |
| Brúkaraprístalið | 100,0 | 117,9 | 118,4 | 0,4 | 2,2 |
| -Matur og drekka | 19,7 | 122,6 | 123,5 | 0,7 | 2,3 |
| -Rúsdrekka og tubbak | 4,8 | 133,3 | 133,6 | 0,2 | 0,8 |
| -Klædnavørur og fótbúnaður | 6,3 | 96,8 | 96,4 | -0,4 | 0,2 |
| -Býli | 17,8 | 123,3 | 122,5 | -0,6 | 4,9 |
| -Húsbúnaður, húsarhaldstól o.l. | 7,8 | 98,0 | 98,5 | 0,5 | 1,2 |
| -Heilsa | 2,0 | 117,3 | 117,9 | 0,5 | 1,3 |
| -Flutningur | 14,0 | 123,9 | 126,3 | 1,9 | 4,0 |
| -Samskifti | 5,1 | 84,7 | 84,1 | -0,7 | -4,0 |
| -Frítíð og mentan | 11,3 | 107,7 | 108,0 | 0,3 | 2,4 |
| -Útbúgving | 0,2 | 119,1 | 119,1 | 0,0 | 0,0 |
| -Hotell og matveitarar | 2,9 | 131,0 | 133,5 | 1,9 | 0,9 |
| -Ymiskar vørur og tænastur | 7,8 | 128,9 | 129,5 | 0,4 | 1,0 |

*Kelda: Hagstova Føroya.*

**Mynd 2.6: Listaprísur á gassolju, 1. jan. 2000 til 1. september 2011**




*Kelda: Effo*

## 2.6 Skatta- og avjgaldsinntøkurnar hjá landi og kommunum

At vøkstur kom í aftur føroyska búskapin í 2010 sæst aftur í skatta- og avgjaldsinntøkunum hjá landi og kommunum. Í 2010 komu góðar 5,7 mia. kr. inn í skatti, og tað eru 256 mió. kr. meira enn í 2009. Hetta er ein vøkstur upp á 4,7%. Avgjaldsinntøkurnar vuksu 5,5% frá 2009 til 2010. Hóast tað almenna fekk væl meira inn í skatti og avgjøldum í 2010 samanborið við 2009, so kom nakað minni inn enn í metárinum 2008. Vøksturin í skatta- og avgjaldsinntøkunum heldur fram í ár, sí mynd 2.7, sum vísir lands- og kommunuskattainntøkurnar fyrstu 8 mánaðirnar, 2001-2011.




## 2.7 Útlit um føroyska búskapin

Samanumtikið kann sigast um føroyska búskapin seinastu árini, at ógvusligi bráðvøksturin í 2006 og 2007 vendi brádliga í 2008 til ógvusliga afturgongd. Í 2009 var botnurin náddur, og síðan tá hevur føroyski búskapurin spakuliga verið á veg upp aftur við onkrum feti aftureftir, og tað gongur framvegis spakuliga framá.

Nýggjastu úrslitini í føroyska konjunkturbarometrinum frá juni í ár benda eisini á, at tað fer at ganga spakuliga framá í føroyska búskapinum í nærmastu framtíð, sí mynd 2.8. Konjunkturkanningin varð gjørd tveir mánaðir fyri, at kreppa aftur breyt út á altjóða virðisbrævamarknaðunum. Fyrivarni skal tí takast fyri hendingunum á altjóða virðisbrævamarknaðunum í seinastuni, tá ið nýggjastu úrslitini í føroyska konjunkturbarometrinum verða greinaði.




Í hesi nýggjastu konjunkturkanningini eru tað byggivinnan, tænastuvinnan og brúkararnir, sum trýsta treystitalið uppeftir, meðan tilfeingisvinnan og handilsvinnan hála niðureftir.

Búskaparvøkstur í fleiri menningarlondum fer at hava við sær, at ein skjótt vaksandi fjøld av brúkarum fara at eftirspyrja dygdargóðar fiskavørur. Marknaðarútlitini fyri føroyska fiskivinnu eru tí yvirhøvur góð.

# 3. LANDSKASSARAKSTURIN 2000-2011

## 3.1 Inntøkur landskassans 2000-2011

Mynd 3.1 vísir gongdina í inntøkum landskassans hesa øldina. Tað er búskaparliga gongdin í føroyska samfelagnum, skerjingin og fastfrystingin av heildarveitingini úr ríkiskassanum í 2002 og árligir skattalættar frá 2005 til 2008, sum hava ávirkað inntøkugongdina hesi árini.

Árini 2003 til 2005 minkaði vøksturin í føroyska búskapinum og sæst hetta aftur við minni vøkstri í skattainntøkum landskassans. Í 2006 og 2007 er stórur vøkstur í skatta- og avgjaldsinntøkum landskassans, serliga í avgjøldunum. Hesi árini var føroyski búskapurin við at kóka yvir við ógvusligum bráðvøkstri í privatu nýtsluni, sum einamest stavaði frá óvanliga stóra kredittvøkstrinum hjá føroysku peningastovnunum.

Í 2008 kólnaði føroyski búskapurin brádliga og gjørdist ísakaldur í 2009, men í 2010 kennist aftur fløvi í føroyska búskapinum. Hetta sást aftur við stórari afturgongd í skatta- og avgjaldsinntøkum landskassans frá 2007 til 2009. Síðan hevur tað verið ein lítil framgongd í skatta- og avgjaldsinntøkunum.




Umframt búskaparligu konjunkturgongdina, so hava politisku tiltøkini at skerja og fastfrysta árligu heildarveitingina, umframt skattalættar, havt stóra ávirkan á inntøkur landskassans.

Í 2002 var heildarveitingin skorin við 366 mió. kr. og síðan fastfryst til 615,5 mió. kr. árliga. Frá 2005 til 2008 vóru árligir skattalættar lætnir fyri 60 mió. kr. [2]

Hesi inntriv á inntøkur landskassans vóru ikki fíggjað við tilsvarandi hækkingum av øðrum inntøkum. Ófíggjaði niðurskurðurin av heildarveitingini sæst aftur við at samlaðu inntøkur landskassans minka øll árini frá 2003 til 2005. Orsøkin til, at ófíggjaði niðurskurðurin av heildarveitingini og ófíggjaðu skattalættarnir ikki síggjast á samlaðu inntøkum landskassans í 2006 og 2007, er ógvusligi bráðvøksturin í føroyska samfelagsbúskapinum hesi árini. Skatta- og avgjaldsinntøkur landskassans av búskaparliga bráðvøkstrinum í 2006 og 2007, vóru væl størri enn kostnaðurin av niðurskurðinum av heildarveitingini og skattalættunum. Tá búskaparligi bráðvøksturin hasar av og vendir til afturgongd í 2008, minka inntøkur landskassans nógv og skjótt. Árliga fallið í inntøkum landskassan í 2008, 2009 og 2010 hevði allarhelst verið meira enn eina hálva milliard minni, um niðurskurðurin av heildarveitingini og skattalættarnir hevði verið fíggjaður við at økja aðrar inntøkur samsvarandi.

## 3.2 Útreiðslur landskassans 2000-2011

Mynd 3.2 vísir gongdina í útreiðslum landskassans hesa øldina. Árligi vøksturin í útreiðslum landskassans hevur verið 4,9% frá 2000 til 2011. Skerjingin av heildarveitingini og skattalættarnir síggjast heldur ikki aftur við samsvarandi sparingum í útreiðslunum. Samlaði útreiðsluvøksturin var t.d. 310 mió. kr. í 2002, sama árið sum heildarveitingin varð skerd 366 mió. kr. og fastfryst. Frá 2005 til 2008, tá ið árligir skattalættar vórðu latnir fyri 60 mió. kr., var árligi útreiðsluvøkstur landskassans í miðal 210 mió. kr. ella 6,1% í miðal um árið.



Mynd 3.2: Útreiðslur landskassans, 2000-2011

[2] Tað skal í hesum sambandi viðmerkjast, at vanligi lønmótakarin hevur ikki merkt so nógv til hesar skattalættar, tí tvungin arbeiðsmarknaðargjøld, t.d. AMEG-gjaldið og barsilsgjaldið eisini eru hækkaði munandi hesi árini. Hesar skattir verða ikki goldnir í landskassan, tí minka inntøkur landskassan uttan at lønmóttakarin merkir nakran skattalætta, tá ið skattalættar verða veittir í inntøkuskattinum samstundis sum tvungin arbeiðsmarknaðargjøld verða hækkaði.

Nógv tann størsti parturin av samlaðu útreiðslum landskassans eru rakstrarútreiðslur. Ein góð helvt av rakstrarútreiðslunum fara til lønir, og umleið 40% fara til pensjónir og aðrar veitingar til einstaklingar.

## 3.3 Úrslit landskassans 2000-2011

Mynd 3.3 vísir samlaða raksturin hjá landskassanum í hesi øldini. Frá 2000 til 2011 hevur árligi miðalvøksturin í útreiðslunum verið 4,9%, meðan árligi miðalvøksturin í inntøkunum bert hevur verið 2,2%. Árligi miðalvøksturin í útreiðslunum hevur sostatt verið meira enn tvífalt so stórur sum árligi miðalvøksturin í inntøkunum.

Helvtin av stóra muninum á inntøku- og útreiðslugongdini hesi tíggju árini kann forklárast við, at niðurskurðurin av heildarveitingini og skattalættarnir ongantíð er fíggjaður við tilsvarandi inntøkum ella sparingum. Hetta hevur givið landskassanum ein bygnaðarligan trupulleika at dragast við.

Hóast heildarveitingin hevði verið fíggjað við tilsvarandi inntøkum ella sparingum, so hevði árligi vøksturin í útreiðslunum verið dupult so stórur sum árligi vøksturin í inntøkunum.

Inntøkur og útreiðslur landskassans skulu javnviga yvir eitt longri áramál, tá atlit eisini eru tikin at konjunkturávirkanini, annars hevur landskassin ein bygnaðarligan trupulleika.




## 3.4 Skuld landskassans 2006-2011

Mynd 3.4 vísir skuld og innistandandi landskassans frá 2006 til 2011. At landskassin hevur havt hall seinastu árini sæst aftur við at skuld landskassans veksur, tí

landskassahallini verða fíggjað við øktari lántøku. Innistandandi ella gjaldførið landskassans er eisini minkað seinastu árini. Frá 2008 til 2011 er bruttoskuld landskassans vaksin úr 3,6 mia. kr. upp í 5,2 mia. kr. samstundis sum innistandandi landskassans í landsbankanum er farið frá 2,2 mia. kr. niður á 1,7 mia. kr.

**Mynd 3.4: Skuld og innistandandi landskassans, 2006-2011**



# 4. FÍGGJARLÓGARUPPSKOTIÐ 2012

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2012 eru ongar politiskar raðfestingar. Fíggjarlógaruppskotið er grundað á framskrivingar av verandi virksemi. Orsøkin til hetta er, at løgtingsval varð útskrivað 27. september 2011. Fíggjarlógaruppskotið fyri 2012 skal sambært stýrisskipanarlógini vera lagt fram áðrenn 1. oktober 2011.

Framskrivingarfortreytirnar eru hesar:

**Rakstrarjáttanir**
Framskrivað verður fyri virksemi, sum endar í 2011 ella broytist í 2012. Somuleiðis verður framskrivað fyri fult ár fyri virksemi, sum er sett í gongd í 2011. Eisini er framskrivað fyri eykajáttanir veittar í 2011 við varandi virknaði.

**Løgujáttanir**
Sáttmálabundið virksemi og framhald av verandi verkætlanum verður tikið við.

**Lógarbundnar játtanir**
Framskrivað verður fyri virksemi sambært galdandi lóggávu.

**Stuðulsjáttanir**
Sum meginreglu eingin framskriving, men tó er onkur játtan framskrivað.

**Ógreinaðar játtanir**
Framskrivað verður eftir metingum sambært galdandi lóggávu.

**Ætlanarárini**
Sum meginregla verður framskrivað í 2012-prísum, t.e. uttan vanligan prís- og lønarvøkstur. Tó verður framskrivað fyri ásetingarbroytingum sambært galdandi lóggávu. Somuleiðis verður í ávísum førum framskrivað, har metti vøksturin er hægri enn vanligi prísvøksturin. Harumframt verður framskrivað fyri at halda verandi tænastustøði, og í ávísum førum framskrivað fyri økt tænastustøði vegna liðugtgerð av byggiverkætlanum.

## 4.1 Inntøkur landskassans í 2012

Inntøkurnar í fíggjarlógaruppskotinum 2012 eru mettar til 4 mia. 364 mió. kr. Herav er skattur 2 mia. 078 mió. kr. Avgjøld, tollur o.a. eru 1 mia. 670 mió. kr. Heildarveitingin o.a. úr danska ríkiskassanum er óbroytt og verður 616 mió. kr., sí talvu 4.1.

**Talva 4.1: Meting av inntøkum landskassans í 2011 og 2012**

| *Mió. kr.* | **Roknsk. 2010** | **FL-2011** | **Meting 2011** | **FLU 2012** | **Munur %** |
|---|---|---|---|---|---|
| Skattir og avgjøld | 3.490 | 3.614 | 3.690 | 3.721 | 0,8 |
| Ymsar inntøkur | 19 | 27 | 106 | 27 | -74,5 |
| Heildarveiting o.t. | 637 | 616 | 616 | 616 | 0,0 |
| **Inntøkur tilsamans** | **4.146** | **4.257** | **4.412** | **4.364** | **-1,1** |

## 4.2 Útreiðslur landskassans í 2012

Rakstrar-, løgu- og útlánsútreiðslurnar (netto) verða mettar til 4 mia. 990 mió. kr. Herav eru rakstrarútreiðslurnar 4 mia. 651 mió. kr., løguútreiðslurnar eru 279 mió. kr., og rentuútreiðslurnar eru 60 mió. kr., sí talvu 4.2.

**Talva 4.2: Meting av útreiðslum landskassans í 2011 og 2012**

| *Mió. kr.* | **Roknsk. 2010** | **FL-2011** | **Meting 2011** | **FLU 2012** | **Munur %** |
|---|---|---|---|---|---|
| Rakstur | 4.500 | 4.529 | 4.610 | 4.651 | 0,9 |
| Rentur, netto | 57 | 39 | 52 | 60 | 15,4 |
| Løgur | 169 | 235 | 232 | 279 | 20,3 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **4.726** | **4.803** | **4.893** | **4.990** | **2,0** |

## 4.3 Úrslit landskassans í 2012

Fíggjarlógaruppskotið 2012 vísir eitt hall upp á 626 mió. kr. (RLÚ-úrslitið), sí talvu 4.3. Fleiri inntøkur eru ikki við, tí lógargrundarlagið fyri ymsum inntøkum dettur burtur við árslok 2011, t.d. Gjald til Heilsutrygd og Tilfeingis/loyvisskattur. Um hesar inntøkur vóru við á sama støði sum í 2011, so var RLÚ úrslitið áleið 129 mió. kr. betri. Tá hevði hallið í fíggjarlógaruppskotinum verið 497 mió. kr., ístaðin fyri 626 mió. kr., sum tað er nú.

**Talva 4.3: Meting av úrslitið landskassans í 2011 og 2012**

| *Mió. kr.* | **Roknsk. 2010** | **FL-2011** | **Meting 2011** | **FLU 2012** | **Munur %** |
|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkur | 4.146 | 4.257 | 4.412 | 4.364 | -1,1 |
| Útreiðslur | 4.726 | 4.803 | 4.894 | 4.990 | 2,0 |
| **RLÚ-úrslit** | **-580** | **-546** | **-482** | **-626** | **29,9** |

# 5. JÁTTANAREFTIRLIT 2011

Í játtanarskipanini er ásett, at saman við fíggjarlógaruppskotinum skal greiðast frá játtanareftirlitinum í fíggjarárinum. Í hesum ritinum verður greitt frá játtanarligu støðuni samanlagt og fyri hvørja grein sær. Í yvirlitinum eru bert tiknar við tær játtanir, sum mett verður fara at víkja frá upprunaligu játtanini, tá ið árið er farið.

**Meting av inntøkum landskassans í 2011 samanborið við fíggjarlógina 2011**

| *tús. kr.* | **FL-2011** | **Meting-2011** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Rentur av skuld | -92.384 | -109.000 | -16.616 | 18,0% |
| Rentuinntøkur o.t. | 53.350 | 57.000 | 3.650 | 6,8% |
| Skattainntøkur | 1.991.510 | 2.072.710 | 81.200 | 4,1% |
| Avgjøld og tollur | 1.772.600 | 1.756.800 | -15.800 | -0,9% |
| Ymsar inntøkur | 27.460 | 106.500 | 79.040 | 287,8% |
| Flyting frá øðrum greinum | -150.000 | -140.000 | 10.000 | -6,7% |
| Heildarveiting o.t. | 615.500 | 615.500 | - | 0,0% |
| **Tilsamans** | **4.218.036** | **4.359.510** | **141.474** | **3,4%** |

**Meting av útreiðslum landskassans í 2011 samanborið við fíggjarlógina 2011**

| *tús. kr.* | **FL-2011** | **Meting 2011** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 189.636 | 213.673 | 24.037 | 12,7% |
| Rakstrarjáttan | 2.840.321 | 2.878.807 | 38.486 | 1,4% |
| Løgujáttan | 234.700 | 231.700 | -3.000 | -1,3% |
| Lógarbundin játtan | 1.499.102 | 1.517.202 | 18.100 | 1,2% |
| **Tilsamans** | **4.763.759** | **4.841.382** | **77.623** | **1,6%** |

**Meting av úrslitið landskassans í 2011 samanborið við fíggjarlógina 2011**

| *tús. kr.* | **FL-2011** | **Meting 2011** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Inntøkur | 4.218.036 | 4.359.510 | 141.474 | 3,4% |
| Útreiðslur | 4.763.759 | 4.841.382 | 77.623 | 1,6% |
| **RLÚ-úrslit** | **-545.723** | **-481.872** | **63.851** | **-11,7%** |

Um tær 87.840 tús. kr. frá uppboðsølu og avgjaldi av makreli verða fluttar í Búskapargrunn, verður frávikið í RLÚ-úrslitinum ístaðin -23.989 tús. kr. Tað hevur við sær, at RLÚ-úrslitið verður -569.712 tús. kr. í 2011.

## § 2 Løgmansfyrisitingin

| Høvuðs konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| **Játtanarliga støðan september 2011** | | | | |
| 11.1.02 | Løgmansskrivstovan | Rakstur | 750.000 | Eykajáttan í mars. |
| **Tilsamans (kr.)** | | | **750.000** | |

## § 3 Fíggjarmál

| Høvuðs konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| **Játtanarliga støðan september 2011** | | | | |
| 15.1.13 | Búskaparráðið | Rakstur | 68.000 | Eykajáttan í mai. |
| 18.2.04 | Danskar eftirlønir | Lógarbundin | -150.000 | Eykajáttan í september. |
| 18.2.07 | Eftirløn landsstýrismanna | Lógarbundin | 150.000 | Eykajáttan í september. |
| 21.2.01 | Stuðul til flutning og dupult húsarhald | Lógarbundin | -600.000 | Eykajáttan í mai. |
| 22.4.01 | Stuðul til rentuútreiðslur | Lógarbundin | -5.000.000 | Eykajáttan í mai. |
| 22.4.04 | Stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði | Lógarbundin | 11.000.000 | Eykajáttan í september. |
| 23.2.07 | Læraraeftirlønir | Lógarbundin | -1.000.000 | Eykajáttan í mai. |
| 24.3.26 | Saltsilo | Stuðul | 20.000.000 | Eykajáttan í mars. |
| 35.1.05 | FAS-endurgjald | Lógarbundin | 25.000.000 | Eykajáttan í september. |
| **Tilsamans (kr.)** | | | **49.468.000** | |

## § 5 Fiskivinnumál

| Játtanarliga støðan september 2011 | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Høvuðs konta** | **Stovnur/játtan** | **Játtanarslag** | **Frávik** *(kr.)* | **Viðmerking** |
| 11.1.05 | Fiskimálaráðið | Rakstur | -100.000 | Eykajáttan í mai. |
| 34.2.01 | Fiskiveiðieftirlitið | Rakstur | 3.400.000 | Eykajáttan í mai. |
| 35.1.10 | Trygdarmiðstøðin | Løgujáttan | 3.650.000 | Eykajáttan í september. |
| **Tilsamans (kr.)** | | | **6.950.000** | |

## § 6 Vinnumál

| Játtanarliga støðan september 2011 | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Høvuðs konta** | **Stovnur/játtan** | **Játtanarslag** | **Frávik** *(kr.)* | **Viðmerking** |
| 11.1.06 | Vinnumálaráðið | Rakstur | -65.000 | Eykajáttan í september. |
| 32.1.04 | Søla av seismiskum kanningarúrslitum | Stuðul | -225.000 | Eykajáttan í mai. |
| 37.1.18 | Skráseting Føroya | Rakstur | 500.000 | Eykajáttan í september. |
| 37.2.04 | Endurgjald til skipasmíð | Stuðul | 772.000 | Eykajáttan í mai á 509 tkr. Eykajáttan í september á 263 tús. kr. |
| 38.2.01 | Strandfaraskip landsins | Rakstur | 10.900.000 | Eykajáttan í mai á 7 mió. kr. Eykajáttan í september á 3,9 mió. kr. |
| 38.2.04 | Tyrlutænastan | Rakstur | 1.600.000 | Eykajáttan í mai |
| 39.1.01 | Semingsmannaskipanin | Rakstur | 65.000 | Eykajáttan í september. |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 39.1.07 | Arbeiðseftirlitið | Rakstur | 500.000 | Eykajáttan í september. |
| **Tilsamans (kr.)** | | | **14.047.000** | |

## § 7 Mentamál

**Játtanarliga støðan september 2011**

| **Høvuðs konta** | **Stovnur/játtan** | **Játtanarslag** | **Frávik** *(kr.)* | **Viðmerking** |
|---|---|---|---|---|
| 23.2.01 | Fólkaskúlin | Rakstur | 1.500.000 | Eykajáttan í mai. |
| 23.3.07 | Tekniski skúli í Klaksvík | Løgujáttan | -3.650.000 | Eykajáttan í september. |
| 23.3.09 | Skúladepil við Marknagil | Løgujáttan | -2.000.000 | Eykajáttan í mai. |
| 23.7.04 | Lestrarstuðul | Lógarbundin | 2.800.000 | Eykajáttan í mai á 3.5 mió.kr. Eykajáttan í september á -700 tús. kr. |
| 23.7.05 | Lestrarlán | Stuðul | 700.000 | Eykajáttan í september. |
| 23.6.16 | Fróðskaparsetur Føroya | Rakstur | 1.000.000 | Eykajáttan í mai. |
| 23.6.24 | ES-granskingarskrá | Stuðul | -500.000 | Eykajáttan í mai. |
| 24.1.22 | Miðlaráðið | Rakstur | 160.000 | Meting. |
| 24.2.10 | Norðurlandahúsið | Stuðul | -400.000 | Eykajáttan í september. |
| 24.3.21 | Varðveiting av mentanararvinum | Løgujáttan | 1.500.000 | Eykajáttan í september. |
| 24.3.23 | Kirkjubømúrurin | Løgujáttan | -500.000 | Eykajáttan í september. |
| 24.6.16 | Langhylur í Vági | Stuðul | 4.000.000 | Eykajáttan í mai. |
| **Tilsamans (kr.)** | | | **4.610.000** | |

## § 11 Heilsumál

| Játtanarliga støðan september 2011 | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Høvuðs konta** | **Stovnur/játtan** | **Játtanarslag** | **Frávik** *(kr.)* | **Viðmerking** |
| 20.2.02 | Heilsutrygd | Rakstur | -1.000.000 | Eykajáttan í september. |
| 20.2.03 | Heilsutrygdarveitingar | Rakstur | 6.000.000 | Eykajáttan í september. |
| 20.2.04 | Kommunulæknaskipanin | Rakstur | -760.000 | Eykajáttan í mai. |
| 20.2.05 | Útbúgving av yngri læknum | Rakstur | -1.000.000 | Eykajáttan í september. |
| 20.3.10 | Klaksvíkar sjúkrahús | Rakstur | -141.000 | Eykajáttan í mai |
| 20.3.15 | Suðuroyar sjúkrahús | Rakstur | 894.000 | Eykajáttan í mai á -106 tkr. Eykajáttan í september á 1 mió.kr. |
| 20.3.20 | Serviðgerð uttanlands | Rakstur | 11.000.000 | Játtaðar eru 8 mió.kr. til Sjúklingaheimi. Harafturat eykajáttan í september á 3 mió.kr. |
| 20.3.30 | Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu | Rakstur | 400.000 | Eykajáttan í mai. |
| 20.4.02 | Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi | Rakstur | 95.000 | Eykajáttan í mai. |
| 20.4.03 | Viðgerðarstovnurin Blákrossheimið | Rakstur | 95.000 | Eykajáttan í mai. |
| 21.3.12 | Gigni – heilsufrøði fyri børn & ung | Rakstur | 170.000 | Eykajáttan í mai. |
| **Tilsamans (kr.)** | | | **15.753.000** | |

## § 12 Almannamál

**Játtanarliga støðan september 2011**

| Høvuðs konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 21.1.04 | Almannastovan | Rakstur | 450.000 | Eykajáttan í september. |
| 21.3.01 | Barnavernd | Lógarbundin | -500.000 | Nýggj meting. |
| 21.4.01 | Dagpeningaskipanin | Lógarbundin | -5.500.000 | Eykajáttan í september á 2,5 mió. kr. Nýggj meting vísur størri avlop: 3 mió. kr. |
| 21.6.01 | Serforsorg | Rakstur | -1.352.000 | Eykajáttan í mai á -500 tkr. Umframt nýggj meting -800 tkr. |
| 21.6.04 | Eldrarøkt | Rakstur | 1.047.000 | Eykajáttan í mai á 247 tkr. umframt meting í september 800 tkr. Tiltøk eru sett í verk at halda játtanina. |
| 21.6.10 | Ansingarsamsýning | Lógarbundin | -800.000 | Meting í september. |
| 21.7.01 | Vanlig forsorg | Lógarbundin | -14.800.000 | Eykajáttan í september á -8,8 mió. kr. Umframt nýggj meting á -6 mió. kr.. |
| 21.8.01 | Fólkapensjón | Lógarbundin | 8.000.000 | Eykajáttan í september. |
| 21.8.05 | Fyritíðarpensjón | Lógarbundin | -2.000.000 | Eykajáttan í september. |
| 21.8.13 | Viðbót til ávísar pensjónistar | Lógarbundin | 1.500.000 | Eykajáttan í september. |
| **Tilsamans (kr.)** | | | **-13.955.000** | |

## § 15 Innlendismál

**Játtanarliga støðan september 2011**

| Høvuðs konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 11.1.23 | Landsins ognir | Rakstur | 200.000 | Minni leiguinntøka enn væntað. |
| 11.1.39 | Innlendismálaráðið | Rakstur | 500.000 | Eykajáttan í mai. |
| 14.1.01 | Ymsar útreiðslur | Rakstur | 1.310.000 | Eykajáttan í mai á 210 tkr. Eykajáttan í september á 1,1 mió. kr.. |
| 30.3.01 | Lánsafturgjald | Stuðul | -100.000 | Eykajáttan í september. |
| 37.4.02 | Umhvørvisstovan | Rakstur | 300.000 | Eykajáttan í september. |
| 38.1.07 | Nýggir landsvegir | Løgujáttan | -3.800.000 | Eykajáttan í mai á -3 mió.kr. Flutt til Havnir við fíggjarnevndarskjali: -800 tkr. |
| 38.1.14 | Havnir | Løgujáttan | 800.000 | Flutt frá Nýggir landsvegir við fíggjarnevndarskjali. |
| 38.1.18 | Stuðul til infrakervið á útoyggjum | Stuðul | -210.000 | Eykajáttan í mai. |
| 38.2.13 | Flogferðsla | Løgujáttan | 1.000.000 | Eykajáttan í mai. |
| **Tilsamans (kr.)** | | | **0** | |

## § 20 Inntøkur

**Játtanarliga støðan september 2011**

| Høvuðs konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 50.1.01 | Rentur at gjalda | Ógreinað | -16.616.000 | Nýggj meting. |
| 50.2.01 | Rentuinntøkur av innistandandi | Ógreinað | 7.000.000 | Nýggj meting. |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 50.2.04 | Aðrar rentur | Ógreinað | -2.850.000 | Nýggj meting. |
| 50.2.07 | Útgoldið yvirskot frá Landsbanka Føroya | Ógreinað | -500.000 | Nýggj meting. |
| 52.1.01 | Vanligur landsskattur | Ógreinað | 35.000.000 | Eykajáttan í september á 25 mió.kr. Umframt nýggj meting 10 mió.kr. |
| 52.1.07 | Felagsskattur | Ógreinað | -6.000.000 | Nýggj meting. |
| 52.1.11 | Kapitalvnningsskattur | Ógreinað | 53.000.000 | Nýggj meting. |
| 52.1.13 | Avgjald av kapitaleftirlønum | Ógreinað | 2.000.000 | Nýggj meting. |
| 52.1.28 | Gjald til Barsilsskipan | Ógreinað | -2.800.000 | Nýggj meting. |
| 52.2.01 | Meirvirðisgjald | Ógreinað | -30.000.000 | Nýggj meting. |
| 52.2.10 | Lønhæddargjald | Ógreinað | -2.600.000 | Nýggj meting. |
| 52.2.13 | Brennioljugjald | Ógreinað | 1.000.000 | Nýggj meting. |
| 52.2.15 | Avgjald á fiskatilfeingi | Ógreinað | 15.800.000 | Eykajáttan í mai. |
| 52.3.01 | Útluting frá Fíggingargrunninum frá 1992 | Ógreinað | 7.000.000 | Nýggj meting. |
| 52.3.05 | Uppboðsøla av fiskatilfeingi | Ógreinað | 72.040.000 | Eykajáttan í mai á 10 mió.kr. Umframt nýggj meting á 62.040 tús. kr. |
| 52.5.01 | Endurrindan av keyps-MVG | Ógreinað | 10.000.000 | Nýggj meting. |
| **Tilsamans (kr.)** | | | **141.474.000** | |

2012

2012

2012